FISKIVINNUTÍÐINDI

Gólvsølan

Góð átta tons vórðu seld um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum fríggjadagin. Selt varð í Klaksvík og á Toftum.

Sýslu-nummar	Skipanavn	Reiðskapur	kilo
FD 256	Aðnasker	snella	80
FD 282	Marianna 2	lína	303
FD 32	Stapin	lína	129
FD 386	Slættiklettur	snella	100
FD 660	Falkurin	lína	375
FD 82	Búgvin	botntrol	695
FD 905	Trúgvi	lína	635
FD1007	Hansa Maria	botntrol	131
FD1137	Rivtangi	lína	435
KG 378	Skørin	lína	29
KG 430	Báran	lína	360
KG 507	Søkin	lína	2.545
SA 79	Ingibjørg	lína	84
TN 483	Ægir	lína	2.065
TN1062	Hvíthamar sp/f Jónleyg	botntrol	9
VN 46	Vesturroðin	snella	104
XV23	Ffv-toftir	lína	232

Vørunavn	kilo
Annað	2
Brosma 0	66
Hýsa 0	11
Hýsa 1	545
Hýsa 2	1.183
Hýsa 3	753
Hýsa 4	516
Havtaska 0	89
Hvasskvoysa	1
Hvítingur 0	534
Kalvi 3	15
Kalvi 4	41
Kalvi 5	82
Kongafiskur 0	27
Liri	18
Longa 0	1
Longa 4&5	6
Longa 5	122
Reyðsprøka 0	32
Skøta	274
Skrubba	664
Steinbítur	120
Svartkalvi 0	1
Toskur 2	340
Toskur 3	951
Toskur 4	1.109
Toskur 5	737
Upsi 0	71

Bókin um Eiler útkomin

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Eiler Jacobsen hevur víst dirvi sum fáur innan føroyskt vinnulív

Endurminningarnar hjá einum av okkara frægu vinnulívsmonnum seinastu 40 árini, er júst útkomin. Útgávan er eitt sindur ørvísi enn við vanligum bókum, tí hon verður útgivin í fyrstu atløgu sum ein forsølubók. Tað vil siga, at fólk hava tekna seg fyri bókina og síðan fáa tey hana sendandi við postkravi.

- Sjálvt um talan er um endurminningar, so havi eg ikki skrivað ein stav sjálvur. Eg havi altíð hildið meg vera gloymskan, men nú eg síggi bókina, so síggi eg, at tað eg minnist tað sum eg havi havt áhuga fyri. Bókin byggir í høvuðsheitinum á samrøðurnar Jógvan Arge hevur við meg í útvarpinum herfyri og tað er Óli Breckmann, sum hevur hevur savnað saman og skriva, sigur Eiler Jacobsen.

Er tað ikki merkiligt at siga og lesa eina bók um seg sjálvan, ið er evnað til av tí ein sjálvur minnist?

- Jú tað er ein løgin kensla. Tað sum eg greiði frá í bókini eru spontant, tað sum eg minnist og eg eri bilsin, hvussu væl Óli Breckmann hevur klárað av savnað alt tilfarið. Hann er ein sannur arbeiðshestur, sigur Eiler Jacobsen.

Bókin er ein partur av vinnuligu søguni í Føroyum og er eisini eitt klassiskt dømi um faðirleysa fátækradrongin, sum kemur so langt fram í lívinum við gudstrúgv, dirvi og ágrýtni.

Posarækjur fyri seks krónur kiloið

RÆKJUR
Jústinus Leivsson Eidesgaard

Rækjuprísurin er í botni og hetta sannaði Eiler Jacobsen, reiðari á Krúnborg, tá Sólborg var og landaði í New Foundlandi fyri trimum vikum síðan.

- Eg havi ongantíð upplivað rækjuprísin so lágan fyrr sum nú. Sólborg landaði 400 tons fyri ein miðalprís upp á 11 krónur kiloið. Fyri tær smáu posarkjurnar fingu teir í meðal seks krónur fyri kiloið, sigur Eiler Jacobsen.

-Vit kunnu slett ikki klaga um fiskiskapin, men tað er óhugaligt, tá prísurin er so lágur, sigur Eiler Jacobsen.

Rækjubátarnir royna nú serliga í kantinum av Grandbank. Innari parturin av Grandbank er stongdur í løtuni.

Sólborg fekk einans seks krónur fyri kiloið av posarækjum, seinast teir vóru í Newfoundlandi og landaðu.

Prísin á rækjum er í botni í løtuni. Myndin er tikin av dekkinum á Hviltenni, sum roynir á Flemmish Cap
Mynd Jens Kr. Vang

Tingmaður: Rímuligt, at vit fáa 30 prosent av svartkjaftinum

Hendrik Old heldur at 30 prosent av heildarkvotuni av svartkjafti er rímuligt fyri føroyingar

SVARTKJAFTUR
Justinus Leivsson Eidesgaard

Javnaðartingmaðurin Hendrik Old heldur tað vera rímuligt, at føroyingar fáa 30 prosent av samlaðu svartkjaftakvotuni.

- Svartkjaftsurin livir størsta partin av ævini í føroyskum og bretskum sjógvi, hann gýtir í bretskum sjógvi og etir seg feitan í føroyskum sjógvi, tí er tað sjálvsagt, at vit hava hevdsrætt yvir einum fittum parti av stovninum. Sama hevdsrætt hava bretar og eg haldi tað er rímuligt at vit fáa 30 prosent og bretar 30 prosent, sigur Hendrik Old, tingmaður fyri Javnaðarflokkin.

Hendrik er skipari, hevur siglt ein stóran part av lívinum og hevur drúgvar royndir í føroyskum fiskivinnupolitikki.

- Vanliga flytir svartkjaftin seg av gýtingarleiðunum vestanfyri Írland og norður eftir við kantinum. Hann fer oftast eysturum, gjøgnum Hetlandsrennuna og spreiðir seg, tá hann kemur norður um, soleiðis at tað ikki ber til at fiska hann. Summi ár fer hann vestur um, og tá kemur hann eisini í Íslendskan sjógv, eins og í ár. Men hetta er ikki vanligt, og tað er heldur ikki vanligt, at hann er í Íslendskum sjógvi, ein og í ár. Tá hann fer vestur um, kann hann veiðast longri í føroyskum sjógvi, enn tá hann fer gjøgnum Hetlandsrennuna, sigur Henrik Old.

- Føroyingar og bretar eiga fyrsta rættin til svartkjaftin, sigur Hendrik Old.

Eingin rentuniðurseting i bræði

Eingin rentuniðurseting verður í næstum, sambært stjóranum í Evropeiska miðbankanum, Wim Duisenberg. Mett verður, at næsta rentuniðursetingin hjá Evropeiska Miðbankanum verður í fyrsta lagi 13. september, sigur Kaupthing Føroyar

Kaupthing Føroyar væntar onga rentuniðurseting í bræði

BÚSKAPUR
Heri á Rógvi

Hin 1. januar 1999 sá ikki einans Evran dagsins ljós, men gjørdist hetta eisini byrjanin til Evropeiska Miðbankan (ECB). Formaðurin, sum stendur odda fyri hesum banka, er hálendingurin Willem F. Duisenberg. Evropeiski Miðbankin myndar, saman við megin bankunum úr øllum limalondunum í ES, "The European System of Central Banks" (ESCB). Føroyska heitið letur bíða eftir sær hesuferð.

Evropeiski Miðbankin hevur verið undir hørðum trýsti frá byrjan av, men Wim Duisenberg hevur støðugt hildið fast um kósina hjá bankanum. Bankin virkar útfrá ES-samtyktum, sum m.a. kunna finnast í Maastrichtsáttmálanum. Wim Duisenberg sær fremstu uppgávuna hjá bankanum vera at ansa eftir prísgongdini í Evropa. Amerikanski búskapurin hevur seinastu tíðina havt trupulleikar, men er spakuliga við at fóta sær. Amerikanski dollarin hevur at kalla frá byrjan verið sterkari mótvegis evruni.

Fíggjarpolitikkur skal til

Sambært "Útlit og Rák", sum Kaupthing Føroyar gevur út, so var væntandi, at Evropeiski Miðbankin fór at lækka rentuna, men soleiðis skuldi ikki vera.

- Seinasta mánaðin hava vit áhaldandi sæð lyklatøl úr Evropa, sum benda á døpru støðuna, ið evropeiski búskapurin er í. Samstundis bendir nógv á, at prísvøksturin í Evropa er fallandi. Tí var væntandi, at ECB fór at seta rentuna niður 5. juli, men tveir dagar frammanundan segði Duisenberg, at rentustigið í Evropa var hóskandi, sigur Kaupthing Føroyar.

Eftir hvat Kaupthing metir, so skal eingin rentuniðurseting væntast í bræði. Teir siga seg meta, at næsta rentuniðursetingin frá ECB í fyrsti lagi verður hin 13. september.

Eftir hvat skilst á Kaupthing og av heimastíðuni hjá ECB, so verður neyðugt at nýta fíggjarpoltik, t.e. útfrá fíggjarlógum, til at betra um støðuna hjá evropeiska búskapinum. Hetta skal, sambært stjóranum í Evropeiska Miðbankanum, nýtast í staðin fyri pengapolitik, sum tekur støði í rentuni og ávirkar samstundis almikið íløguvirksemi. Marknaðurin í Evropa hevur, sambært Kaupthing Føroyar, bíðað eftir einari rentuniðurseting, og vóru nýggjastu útmeldingarnar frá Evropeiska Miðbankanum skuffandi fyri marknaðin.

Gongdin í Evropa tykist at vera tann, at prísvøksturin, sum hevur gjørt seg galdandi seinastu tíðina, tykist at vera fallandi, men tað tykist sum um, at tann vantandi rentuniðursetingin kom illa við evropeiska marknaðinum.

Síðani Evran sá dagsins ljós, so hevur hon sjálvandi merkt evropeiska búskapin, og hetta hevur heldur ikki verið uttan trupulleikar. Amerikanski búskapurin tykist eisini at vera sterkari í løtuni. Wim Duisenberg, formaður í Evropeiska Miðbankanum, tykist tó at halda fast við sína kós.

Onga ávirkan á Føroyar

Vantandi rentuniðurseting kemur væntandi ikki at ávirka føroysk partabrøv ella føroyskan búskap. Í Føroyum er sum so eingin partabrævamarknaður. Tey fáu føroysku partabrøvini, sum eru skrásett, koma væntandi ikki at merkja nakað til tað, at eingin rentuniðurseting kom á hesum sinni. Sjálvandi ávirkar gongdin í Evropeiska og amerikanska búskapinum støðuna hjá føroyska búskapinum, men higartil síggjast at kalla eingi árin.

Tó valdi danski tjóðbankin at seta rentuna niður fyri einari góðari viku síðan. Tað var danska repro-rentan, sum varð sett niður við 5 grundstigum til 4,95 %, sigur Kaupthing Føroyar.

- Orsøkin er, at danska krónan er styrknað mótvegis evruni í seinastuni, og at gjaldoyrargoymslan hjá tjóðbankanum er lutfalsliga full. Sjálvt um rúm er fyri fleiri sjálvstøðugum donskum rentuniðursetingum, meta vit ikki, at nøkur størvegis rentuniðurseting verður í Danmark, fyrr enn ECB eisini setur evropeisku renturnar niður, sigur Kaupthing Føroyar.

Vit gera ikki hálvar semjur

ÓSEMJA
Áki Bertholdsen

Enn er onki komið burturúr royndunum hjá Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrinum at finna semju um KT-vørðarnar í føroyska fólkaskúlanum.

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen, sigur, at fundir hava verið við Fíggjarmálastýrið um KT-vørðarnar, men at onki er komið burturúr.

Hon sigur, at Fíggjarmálastýrið vil hava tey at býta samráðingarnar í tvey, men tað vil Lærarafelagið ikki.

– Fíggjarmálastýrið vil hava okkum at gera semju um tann námsfrøðiliga partin av KT- varðaskipanini. Hinvegin sigur Fíggjarmálastýrið, at tann tekniski parturin av skipanini hoyrir undir kommununa, so tann partin má Lærarafelagið samráðast við kommunurnar um.

Men hetta vil Lærarafelagið ikki góðtaka.

– Vit gera ikki hálvar semjur, sigur Lærarafelagið.

Elsa Birgitta Petersen sigur, at KT-varðaskipanin er ein heild og at felagið bara vil gera semju um alt økið undir einum.

– Tað er ikki okkara trupulleiki um KT-varðaskipanin er í einum, ella í tveimum. Vit taka heldur ikki støðu til, antin Fíggjarmálastýrið heldur, at kommunurnar skulu betala ein part av skipanini, ella ikki.

Heldur Fíggjarmálastýrið, at kommunurnar hava ábyrgdina av tí tekniska partinum, má tað seta seg í sambandi við kommunurnar at fáa eina semju um tað.

– Tá ið Fíggjarmálastýrið so hevur fingið semju við kommunurnar, kunnu samráðingar aftur vera við okkum um KT- varðarnar sum eina heild.

Felagið stúrir fyri, at gera tey semju um ein part av skipanini, fer hin parturin at verða liggjandi óloystur í fleiri ár.

Ikki óvæntað

Tað kemur ikki óvart á Lærarafelagið, at tað verður trupult at semjast um KT-varðaskipanina.

Hetta er ein nýggj skipan, sum kemur í gildi 1. august.

– Hetta er ein rættiliga dýr skipan. KT vørðarnir skulu lønast eftir, hvussu stórir skúlarnir eru, tvs, hvussu nógvir lærarar og næmingar eru í skúlanum og, hvussu teldur eru í skúlanum.

– Hetta er ein skipan, sum krevur rættiliga nógv arbeiði og tí krevur KT varðaskipanin nógvar tímar og hampiliga stóra játtan.

Ein bólkur við tveimum umboðum úr Mentamálastýrinum og einum umboðum fyri Lærarafelagið hevur gjørt eitt álit um, hvat arbeiðið hjá KT vørðunum skal fevna um, og, hvussu teir skulu lønast. Sostatt eru Mentamálastýrið og Lærarafelagið samd um, hvussu KT vørðarnir skulu skipast.

Hetta álitið er latið Fíggjarmálastýrinum og Elsa Birgitta Petersen vónar, at Fíggjarmálastýrið tekur fæst at taka undir við álitinum frá Mentamálastýrinum og Lærarafelagnum um, hvussu KT vørðarnir skulu lønast.

Hinvegin hevur Lærarafelagið gjørt semju við Fíggjarmálastýrið um, hvussu lærararnir í teimum nývaldu skúlastýrunum skulu lønast.

Samstundis er eisini semja um, hvussu limirnir hjá Lærarafelagnum í námsfrøðiliga ráðnum, skulu lønast.

Enn hevur tað ikki eydnast okkum at finna semju um KT-vørðarnar í fólkaskúlanum, men tað var ikki annað enn forkvinnan í Lærarafelagnum, Elsa Birgitta Petersen, hevði roknað við